# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/04 - 8. apríl 2021 16:00-18:00

### Skrá:

1. Kantinuætlanin - Sigurð leggur fram ætlanina við kantinuni og hvar málið liggur (20 min). Síðan er kjak og stýrið ger í grovum trekkum ætlan (at leggja fyri kommununa) til leiðsluna at arbeiða víðari við.
2. Svarskriv til hoyring um ætlaðar tillagingar í upptøkureglunum.
3. Snøklar til 21/22
4. Ymiskt

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Ruth, Bjørg, Sjúrður, Derhard, Erla & Snorri |
| Forfall: | Snorri og Ruth verða seinkað |
| Gestir: | Sigurð Ó. Vang, leiðari á mentamáladeildini |

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**Kantinuætlan**
Skúlastjórin lesur upp áheitan frá námsfrøðiliga ráðnum. Áheitanin er viðfest.
Sigurð Ó Vang, leiðari á Mentamáladeildini í TK, ið er gestur á stýrisfundinum, leggur fram málið um kantinuna fram frá byrjan til í dag.
SÓV leggur fram byggiskránna, ið sigur at kantina skal vera virkin partur av skúlanum. Talan skal vera um fullan framleiðslukøk. Tað skal bera til hjá næmingum og starvsfólkum at keypa heitan og kaldan mat.
Parturin av byggiskránni, ið umrøður kantinuna er viðfest.
Síðan er kvirt um málið til primo 2019, tá verkstova verður hildin. Verkstovan snýr seg um innihald og møguleikar. Niðurstøðan er, at kantina skal verða, men verkætlanin fer ikki í gongd.
Kjakast varð um uppseting og innihald. Prísir, matskrá og luttøkukrav/sjálvboðið, skipan, logistikkur og eindarkostnaður, men eingin eintýðug niðurstøða fyriliggur.
Primo 2020 er aftur ein verkstovudagur har umboð fyri leiðsluna, kommununa og onnur er við.
Høvuðsendamálið er at fáa verksett eina kantinuloysn í SáF. Vitjað verður m.a. á Glasi.
Á Glasi er ein væl skipað kantina. Kantina á SáF kundi verið skipað við fyrimynd í Glasi.
Verkætlanin fór kortini heldur ikki av bakkastokki tá.
Mett verður um búskapin í eini kantinu. Tá er metingini, at ein kantina væntandi fer at selja til helmingin av næmingunum og at hvør servering krevur studningsrakstur á á leið 15-20 kr pr verð, um talan er um heitan mat.
Ein partur av hugsanini er eisini, at næmingar í mið- og hádeild kunnu innganga í ávísan mun í framleiðsluni at mati.

Ein annar partur av verkætlanini er harumframt, at kantinan skal við tíðini kunna veita mat til aðrar skúlar við serveringskøki í býnum.

Foreldraumboðini taka undir við at kantina skal setast í verk. Samstundis verður týdningurin av at fylgja almennu kostráðunum undirstrikaður. Hetta er leistur, ið foreldaumboðini ynskja. Tað er eitt hugskot, at seta ein framskygdan køksleiðara frá 1. august at menna eitt køkskonsept til skúlan við virknaði frá 1. Januar 2022. Skúlakantinan má fevna um árstíðina, føroyska matmentan og nútíðarmentan við djóravalferð og vistfrøði. Skúlastjórin undirstirkar at hetta er eisini í tráð við virðini hjá skúlanum.

Kommunuumboðini í skúlastýrinum eru eitt sindur í iva um kantinuætlanin kann taka ábyrgd frá foreldrum og skapa ein ójavna millum næmingar. Tí er tað av stórum týdningi, at tað kostnaðurin er lágur og at skipanin er valfrí. Kunustýrini seta eisini spurnartekin við um tað ber til at hava ein stóran studningsrakstur á einum skúla og ikki veita mat á hinum skúlunum í býnum. Tí meta tey, at loysnin við at veita øðrum skúlnum mat má hugsast inn beinanvegin.

Skúlastýrið heitir tí á kommununa beinanvegin at seta ein kostfakligan verkætlanarleiðara at gera eina tørvslýsing, ein profil til eina kantinu, eina ætlan og at royna hetta í verki í eini small scale verkætlan. Endamálið við eini slíkari verkætlan er at vísa á eina góða gongda leið fyri eini skilagóðari, heilsgóðari kantinu við eini rímiligari prísl egu við støði í nýggju almennu kostráðunum.

Ad.2
**Hoyringssvar**
Skúlastýrið gjøgnumgongur nýggju leiðreglurnar í síni heild. Í høvuðsheitum tekur skúlastýrið undir við tankanum um at børn skulu sleppa at ganga í skúla í sínum nærumhvørvi.
Foreldraumboðini, skúlastjórin og starvsfólkaumboðið eru kortini sera skeptisk mótvegis raðfestingini, ið forskúlatilboðið hevur fingið.
Tí hevur skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum hesar viðmerkingar:

1.
Skúlaøkið má liggja úti nóg tíðliga. Leiðreglurnar leggja upp til at økið skal vera tøkt á torshavn.fo tíðliga um heystið. Skúlastýrið metir at hetta er alt ov seint. Skúlaøkið má liggja úti um heysti, tá møguleiki er at skriva inn í forskúla. Tí eitt samt skúlastýrið metir at tað er av avgerandi tídnigi at foreldur vita um tey kunu vænta pláss í 1.fl tá tey skriva síni børn í forskúla. Tí má korti vera tøkt 1,5 frammanundan innskriving til 1.fl.
2.
Skúlastýrið tekur undir við tankanum um at skúlamørkini aftur skulu vera greið. Kortini metir skúlastýrið, at næmingar, ið búgva á markinum millum skúlar í størri mun skulu fáa ágóða av systkynnafyrimuni.
3.
Systkinnafyrimunur eigur at telja meira enn adressa. Systkinnafyrimunur skal galda frá 1-7.fl.
4.
Skúlastýrið setir spurnartekin við um tað ber til at nýta hesar nýggju leiðreglurnar til upptøku í 1.fl skúlaárið 22/23 fyri næmingar sum eru innskrivaðir í forskúla í 21/22. Hesir næmingar eru innskrivaðir eftir reglum, sum vóru galdandi innskrivingardagin. Tì mugu gomlu leiðreglurnar galda fyri hesar næmingar til innskriving í 1.fl 22/23.
5.
Skúlastýrið undrast á, at kommunan raðfestir útisetar aftur um í røðini í innskrivingini. Skúlastýrið ynskir, at útisetar ikki verða settir afturum borgarar í kommununi, tí eitt vanligt mynstur millum útisetar er, at

hesi flyta heim, tá elsta barnið skal í 1.fl. Hetta eigur komunan at lofta betur, og tí eiga tey ikki at setast aftur um við punktinum "næmingar, ið longu eru borgarar í kommununi, hava framíhjárætt".

Hetta hoyringssvarið verður sent kommununi

Ad.3
**Snøklar 21/22**
Skúlastjórin kunnar um, at enn eru snøklar at avgreiða í.s.v. upptøku av næmingum skúlaárið 21/22. Kommunan hevur framvegis ikki avgreitt undantaksloyvið til 8.fl. Hetta ger, at øll ráðleggingin er seinkað útvið 6 vikur higartil. So møguliga verður SáF seinastur í røðini at lýsa eftir starvsfólki. Vónandi hendir hetta ikki.
Stovuætlan við meira er við at koma upp á pláss í.s.v. 1.fl. Her er ein fín loysn funnin, ið heldur fyribils 3 ár.

Ad.4
**Ymiskt**
Einki mál er undir ymiskum.

Ad.5
**Áseta næsta fund**
16/9 -kl 16